**Stytting viðvíkjandi gastromatstøðaraútbúgvingini**

Eftir áheitan frá Yrkisútbúgvingarráðnum viðgjørdi yrkisnevndin eina ferð enn spurningin um stytting av lærutíðini vegna lokna gastronomatstøðisútbúgving. Yrkisnevndin varð samd um hesar styttingar, treyta av at lærlingurin fær góðskriva skúlagongdina:

- Næmingur, ið hevur staðið støðisútbúgvingarpartin til gastronomatstøðisútbúgvingina og fer í læru sum kokkur, fær **30 vikur stytting**. Styttingin er grunda á frítøku frá grundskeiðnum á 20 vikur og 1. skúlaskeið í høvuðsskeiðnum á 10 vikur. Um lærlingur og læruplass semjast um tað, kunnu partarnir søkja yrkisnevndin um at stytta lærutíðina upp til 1 ár, og skal tað verða avgreitt áðrenn royndartíðin á 3 mánaðir er úti.

- Næmingur, ið hevur staðið fulla gastronomatstøðisútbúgving og fer í læru sum kokkur, fær 1 ár stytting. Um lærlingur og læruplass semjast um tað, kunnu partarnir søkja yrkisnevndina um at stytta lærutíðina upp til 1 ár og 6 mánaðir, og skal tað verða avgreitt áðrenn royndartíðin á 3 mánaðir er úti.

- Næmingur, ið hevur staðið støðisútbúgvingarpartin til gastronomatstøðisútbúgvingina ella fulla gastronomatstøðisútbúgving og fer í læru sum tænari, fær **20 vikur stytting**. Styttingin er grunda á frítøku frá grundskeiðnum á 20 vikur.

- Næmingur, ið hevur staðið støðisútbúgvingarpartin til gastronomatstøðisútbúgvingina ella fulla gastronomatstøðisútbúgving og fer í læru innan aðra matvøruútbúgving enn kokk og tænara, fær **20 vikur stytting**. Styttingin er grunda á frítøku frá grundskeiðnum á 20 vikur.